# Kunngerð um ferðslu á Ólavsøku 2006

Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag 28. og 29. juli frá kl. 1400 til næsta morgun kl. 0800 verða hesar broytingar í ferðsluni:

Bilferðsla er **ikki** loyvd, eftir **Kopargøtu, á Áarvegnum og niðan á Vaglið, í N. Finsensgøtu frá Vaglinum og niðan til AUTO, ella í Mylnugøtu.** Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er **ikki** loyvd tvørtur um **Niels Finsensgøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún**, undantikið eru hýruvognar, Buss- og Bygdaleiðir.
Um hetta vegamót gongur støðugt nógv fólk, tí má koyrast við størsta varsemi.

**Í Niels Winthersgøtu, í Steinatúni og í Bøkjarabrekku** er loyvt hýruvognum at søkja hýru.

Meðan kappróðurin fer fram Ólavsøkuaftan, er **Eystara Bryggja stongd** fyri vanligari bilferðslu **frá Kongabrúnni til Jónas Broncksgøtu** frá kl. 1400 til kl. 1900.

Á parkeringsøkinum á Bursatanga er ikki loyvt at parkera frá 27. juli kl. 2000 til 29. juli kl. 0900.

**Tórsgøta frá Sverrisgøtu oman til Vágsbotn er stongd fyri vanligari bilferðslu.**

**Ólavsøkudag**, frá kl. 1000 til kl. 1400, verður øll ferðsla um **Vaglið** órógvað og ikki kann roknast við, at koyrandi verður eftir Mylnugøtu, Áarvegnum um Vaglið v.m. Vegna skrúðgongu úr Føroya Løgtingi í Dómkirkjuna og aftur

Tórshavn, hin 25. juli 2006.

**Politiið**

# Minningargrunnur

## Dánjal Niclasen's

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2006 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's eiga at verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin, hin 10. august 2006.

Umsóknarblað fæst við at fara á heimasíðuna www.faroe.com ella heimasíðuna www.united.fo ella seta seg í samband við Faroe Seafood, tel. 35 55 55. Umsóknarblaðið skal sendast til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen's:

**Minningargrunnur Dánjal Niclasen's**
**c/o Faroe Seafood**
**Postboks 68**
**FO-100 Tórshavn**
**Att.: Meinhard Jacobsen, nevndarformaður**

*Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær* ***víðari útbúgving*** *innanfyri føroyska fiskivinnu. Í 2006 verða umsóknir um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's raðfestar á henda hátt:*

- *Serútbúgving í handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*
- *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
- *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
- *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuhættir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*

Sosialurin 341800

## Hondbóltsamband Føroya

Eykaaðalfundur verður í ÍSF húsinum leygardagin
2. september 2006 kl. 10.00

**Starvsnevndin**




www. Sosialurin .fo

Sosialurin


# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



**Ring og hoyr nærri**

- Konsertir
- Fundir
- Framsýningar
- og annað

miðlahúsið
í Vágsbotni

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO | Sosialurin